Møti og málningar í einum

Samkoman Lívdin í Hoyvík skipar páskadag fyri serstøkum møti við framsýning, filmi og drama

PÁSKAMØTIR

Snorri Brend

Hoyvík: Tey, sum páskadag fara á møti í Lívdini fáa eitt serstakt møti henda hátíðardagin.

Tema fyri møtið er sjálvandi deyði og uppreisn Kristusar. Men hesaferð hevur ein valt at gera eitt sindur meiri burturúr møtunum.

Tvey møtir eru á skránni henda dagin. Meðan ein við fyrra møtið fer at hava drama á skránni, verður seinna møtið merkt av filmi og eini málningaframsýning.

Málningar úr filmi

Á fyrra møtinum í samkomuni, sum byrjar kl. 10:30 verður drama fyri børnunum.

Tað eru ungfólk úr PVE-eftirskúlanum í Damark, sum í løtuni eru í Føroyum, ið fara at framføra henda dramaleikin. Á hesum møtinum fer eisini Jógvan Zachariassen at tala.

Eftir ein styttri steðg verður síðani farið til seinna møtið henda dagin.

Á hesum møtinum, sum byrjar kl. 12 verða m.a. brot úr filminum "The passion of the Christ" víst. Í samband við hetta fer Anna Háberg at hava nakrar hugleiðingar um líðing Kristusar.

Samstundis við møtið verður eisini ein framsýning av málningum. Í hølinum verða nevniliga málningar eftir Hedvig Jóhansdóttur at síggja.

Hedvig hevur nýtt filmin "The passion of the Christ" sum íblástur til málningar og blýantstekningar sínar.

Hedvig Jóhansdóttir hevur fingið íblástur til fleiri málningar og tekningar úr filminum "The passion og the Christ". Nakrar teirra fer hon at vísa fram á møtinum í samkomuni Lívdini páskadag

Fyrsta páskastevnan í Skálafirði

Undanfarin ár hevur páskastevnan verið í ítróttarhøllini á Skála. Í ár verður hon hildin í Kelduni á fyrsta sinni. - Vit ynskja at reisa upp Guds kvinnur og menn at taka andaliga ábyrgd í landi okkara, sigur Pauli Høj, leiðari í samkomuni

KRISTILIG TILTØK

Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo

Nýggi samkomubygningurin í Skálafirði hevur longu staðið sína roynd við mong ymisk tiltøk. Nú verður hann á fyrsta sinni karmur um páskastevnuna

Nógvur tónleikur er á skránni til páskastevnuna í ár. Eisini her eru hentleikarnir hjá sangarum og tónleikarum teir bestu

Skálafjørður: Hjørdis Petersen verður fyrsti talarin, tá árliga páskastevnan hjá Kelduni byrjar í annaðkvøld.

Tað hevur verið siður í mong ár at hava slíkar páskastevnur í Havn og á Skála. Men nú samkoman í Kelduni tók tann nýggja bygningin í nýtslu í fjør, verður hann nú karmur um páskastevnuna í ár.

Á páskastevnuni verður luttøka ymsastaðni frá í Føroyum. Dentur verður nevniliga lagdur á at nýta føroyskar samkomuleiðarar og aðrar góðar og framstandandi talarar úr okkara egna landi.

- Vit trúgva, at henda páskastevnan fer at reisa Guds menn og kvinnur upp, sum vilja ávirka og taka ábyrgd fyri okkara landi og fólki, sigur Pauli Høj, sum er samkomuleiðari í Kelduni.

Út frá hesum er eisini heitið fyri stevnuna tikið "At liva á eggini", sum vísir á ein hátt at liva fyri Harran, so ikki tað humanistiska tíðarrákið skal vinna frama her á landi.

Eins og undanfarin ár verður nógv gjørt burtur úr stevnuni. Millum tiltøkini kunnu nevnast morgunmøtir, festmøtir, barnamøtir, familjumøtir, syngið-viðkvøld og ungdómskvøld við m.a. drama- og dansiframførslu.

Kristnu virðini

At Keldan í fjør kundi taka tann nýggja samkomubygningin í brúk, hevur skapt ein hóp av møguleikum fyri tiltøkum í húsinum.

Nú ber væl til at skipa fyri eini slíkari stevnu í Kelduni, sum hevur tær allar bestu umstøðurnar at halda eina slíka stevnu, sum skiftir annaðhvørt ár millum høvuðsstaðin og Skálafjørðin.

Við páskastevnuni í ár vónar Keldan, at kunna kveikja lív og íblástur í samkomulívið í Føroyum.

– Á henda hátt er endmálið at verða til uppbyggjan og endurnýggjan fyri øll trúgvandi.

– Okkara bøn er tí at vit skulu síggja menniskju frelst, grødd og loyst, soleiðis at tey kunnu fara í tænastu fyri Harran, sigur Pauli Høj.

Gjøgnum boðanina á páskastevnuni er ætlanin at vísa á, at okkara land skal verða ein fyrimynd, har tey kristnu virðini og kristnu sannleikarnir ganga fram.

– Soleiðis kunnu vit, sum ein lítil tjóð, eisini vera við til at ávirka aðrar størri tjóðir kring okkum, verður sagt.

Tiltøk á páskastevnuni

Barnamøtir:
Í meðan foreldrini eru á festmøti, fara børnini á barnamøti. Barnamøti byrjar eina løtu eftir at festmøti er byrjað. Ymiskar samkomur skipa fyri dansi, drama, søgum og sangi.

Morgunmøtir:
Kl. 10.30 eru morgunmøtir við talara og sanglutttøku. Síðan er ein stuttur kaffisteðgur, til næsta møti byrjar kl. 12

Konsert:
Langa fríggjakvøld er konsert kl. 21.30. Luttakandi bólkar eru Torkil Mørkøre, Magni Christiansen, Credo og Heine Lützen.

AWAKE XL:
Leygarkvøldið er ungdómskvøldið burturav. Dansibólkar, drama, lovsangur, Direct Level og ein radikalur boðskapur.

Syngið við:
Sunnukvøldið kl. 21.30 er eitt tiltak fyri øll - vit njóta nakrar av teimum góðu gomlu slagarunum. Forsangarar eru m.a. Finnur Hansen, Petur Hans Hansen og Lisa Frederiksberg.

Familjumøti:
Familjumøti er leygardagin kl. 15.30. Hetta er møti fyri alla familjuna.